


# *Til upptøkur* AV KING KONG

*Her er tað King Kong, sum hevur fingið fingrarnar í Naomi Watts. Pallsetingin er nakað væl meira dramatisk, eftir hon er gjørd líðug á teldu*



*Peter Jackson leggur lag, tá ið upptøkur verða gjørdar í filmsstudio*

Seinastu vikurnar hevur stórfilmurin um King Kong verið tann best umtókti biograffilmurin kring heimin.

Peter Jackson, sum var leikstjóri til teir tríggjar filmarnar um Ringanna Harra, hevur aftur verið upp á spæl, og hann hevur framleitt ein framúrskarndi film burtur úr gomlu søguni um King Kong.

Hóast filmurin er stórsligin, og King Kong millum annað ger um seg í New York, so eru nógvar av upptøkunum í filminum gjørdar í filmsstudio, og har verður ofta tikið upp ímóti einum grønum skýggja, har bakgrunin í pallsetingini síðani verður løgd inn við teldu.

Tøknin, sum verður brúkt til at framleiða slíkar stórslignar filmar sum King Kong, er sera framkomin, og úrslitið á hvíta tjaldinum er sera veruleikakent. Filmur er ein illusion, men tað er gott handverk, og tað undirheldur milliónatals fólk kring allan heimin.

## SVIMJA SAMAN VIÐ KROKODILLUM



Í Cango Wildlife Ranch, sum liggur í Cape Town í Suðurafrika, hava fólk møguleikan at svimja saman við livandi krokodillum, sum eru tiknar úr Nilánni. Her verður ein vitjandi í djórðagarðinum sleptur niður í ein hyl, har fýra krokodillur svimja. Kvinnan er í einum búri, sum skal verja hana ímóti krokodillunum, men tað man krevja eitt sindur av móti at lata seg fara niður í hylin saman við krokodillunum.

*(Mynd: Scanpix)*

## FORMURIN SKAL HALDAST Á JÓLUM



Jólini hava nógvar freistingar við sær. Góður matur er at fáa allastaðni, og fólk plaga ikki at halda seg aftur við at eta júst á jólum. Soleiðis er ivaleyst hjá teimum kendu eisini, men formurin skal eisini haldast á jólum, og sjónleikarin Matthew Perry gongur íðin til venjingar í eini venjingarmiðstøð í Beverly Hills. Á myndini er Perry, sum er kendur frá røðini Vinir, á veg frá venjing, og hann ásannar helst, at tað krevur eitt sindur at halda seg í form – eisini í jólamánaðinum.

*(Mynd: Mavrixphoto.com)*

## RISA HØGGUSLOKKUR SÝNDUR FRAM



Hesin risastóra høgguslokkurin verður sýndur fram á Melbourne Museum í Australia. Smágentan smæðist ikki tann stóra høgguslokkin, sum varð fangaður nærindis Tasmania. Høgguslokkar av hesum slagnum kunnu gerast upp í 18 metrar langir, og teir kunnu viga meira enn 300 kilo. Høgguslokkurin, sum kann síggjast í Melbourne er 10 metrar langur. Høgguslokkar sum hesir kunnu liva í eini dýpd á 1 kilometur, men júst hesin kom í eina nót hjá einum fiskimanni av Tasmania.

*(Mynd: Scanpix)*




BIG KING XXL
Stórt, skjótt og gott...
Burger King and Whopper are registered trademarks of the Burger King Corporation